# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

**Svarari:** Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

**Evni:** Verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum

**Spurningar:**

1. Hvussu fer landsstýrismaðurin at raðfesta hetta málið í næstum?
2. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi at seta filtur upp, sum verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi, á internetinum?
3. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrismaðurin viðvíkjandi at gera ein almennan politikk, sum stuðlar og vegleiðir foreldrum í at verja síni børn ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum?
4. Nær kann væntast at hesar ætlanir blíva til veruleika?

**Viðmerkingar:**
Tann 3. mai 2023 tók eitt samt Løgting undir við at heita á landsstýrið um at verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum.

Áheitanin var soleiðis orðað:

*"Løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna møguleikarnar fyri tekniskum loysnum, ið verja børnini ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum og at gera ein almennan politikk um, hvussu foreldur verja síni børn á bestan hátt og leggja fram neyðug lógaruppskot í hesum sambandi."*

Uppskotið, ið varð samtykt, er soleiðis í tveimum pørtum:

i) At seta filtur upp, sum skánar børnini fyri porno og øðrum ágangi á internetinum.
ii) Gera ein almennan politikk, sum vegleiðir og stuðlar foreldrum í at verja síni børn ímóti porno og øðrum ágangi á internetinum.

Fyrispurningurin verður settur fyri at hoyra, hvussu landsstýrið hevur móttikið hesa áheitanina, og hvussu hetta álvarsmál verður raðfest í nærmastu framtíð.

**Á Løgtingi, 12. juni 2023**

Steffan Klein Poulsen